gult12 cyan12 magenta12 svart12



# Nagli í hurðina á flakavirkinum í Sørvági



*Flakavirkið í Sørvági stendur tómt og stongt á bryggjuni*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Alt virksemi á flakavirkinum í Sørvági er endaliga hildið uppat, og Føroya Sparikassi hevur biðið um, at maskinurnar verða seldar**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*

**Sørvági:** Maskinurnar á flakavirkinum í Sørvági eru lýstar til sølu. Virkið er stongt og letur ikki upp aftur við verandi felag aftan fyri.

Hóast flakavirkið er stongt er nakað av lívi á bryggjuni í Sørvági. Teir koyra fisk inn á móttøkuna hjá Vinjardi, har hann verður skildur og vigaður, áðrenn hann fer á uppboðssøluna.

Eini tveir smærri útróðrarbátar standa uppi og fáa neyðugar ábøtur. Har ganga menn í oljuklæðum og spula og skrava. Tað er vist eisini rímilig tíð til sovorðið beint nú. Váróðurin er av, og líkindini eru batnandi í løtuni, so kanska tað verður møguleiki fyri at fáa ein slett av máling upp á eisini, áðrenn flotað verður aftur.

Vesturvón liggur longri úti. Hann riggar til at fara nýggjan túr. Kranin flytir plattar við troli og aðrari útgerð umborð.

Teir skulu mynstra flaggdagin. Tá verður farið ein svartkalvatúr vestureftir, siga teir frá.

Men flakavirkið er stongt. Steindeytt. Og maskinurnar, sum inni á virkinum standa, standa eisini aðrastðani í dag. Ein lýsing í Sosialinum sigur frá, at ein advokatur í Havn selur alla útgerðina, sum inni á virkinum er.

Tað er Ólávur Jákup Kristoffersen, advokatur, sum selur maskinurnar. Hann sigur í stuttari viðmerking við Sosialin, at hann selur vegna Føroya Sparikassa, sum hevur veð í ognunum hjá felagnu,m sum hevur rikið flakavirkið.

Talan er um eitt felag, sum sølufyritøkan Farex í Havn stendur aftanfyri. Eitt sonevnt »datopartafelag«, sum so aftur hevur staðið fyri leigu av bygninginum og rakstrinum av virkinum.

Men virkið hevur ligið stilt síðan áðrenn jól, so rakstur hevur eingin verið í vetur og í vár. Nevndarformaðurin í felagnum segði annars við Sosialin fyrr í vár, at teir løgdu virkið stilt eina tíð, meðan ávísar ábøtur vórðu gjørdar inni á virkinum. Millum annað nevndi hann tá, at frystiorkan var ov lítil og skuldi byggjast út. Síðan var ætlanin at fara undir at arbeiða saltfisk einaferð út móti páskum, segði hann tá.

Men har er so einki hent við tí, skilir Sosialurin í dag. P/F Vesturvón, sum eigur bygningin, hevði ongar rætlanir um at byggja frystiorkuna út, fingu vit tá at vita frá Vesturvón.

Seinni er so tað hent, at Vesturvón, umvegis Fútarættin, hevur stongt virkið, tí felagið hevur onga leigu fingið frá partafelagnum, sum stóð aftan fyri flakavirkið í Sørvági.

Nágreiniligu gondina í málinum tykist vera ógvuliga ringt at fáa lýst. Stjórin á flakavirkinum, Poul Arni Jacobsen, hevur onga viðmerking. Nevndarfomaðurin, Rói Egholm, er á fiskivinnumessu í Bruxelles. Tá vit høvdu hann í telefonini týsdagin, vildi hann ikki gera aðrar viðmerkingar enn, at virkið var stongt, og letur ikki uppaftur. Tað er ikki fíggjarlig orka til tað, skilja vit. Hann vísti annars til annan advokat enn tann, sum selur maskinurnar fyri Føroya Sparikassa. Hesin advokaturin segði seg tó einki hava við hasa søluna at gera og vildi ongar viðmerkingar gera yvirhøvur.

Stjórin á Vesturvón vildi bara vátta, at P/F Vesturvón hevði stongt virkið við hjálp frá Fútarættinum. Um Vesturvón fer at keypa maskinurnar, sum standa inni í bygninginum, felagið eigur, vildi hann ikki gera viðmerkingar til. Men hann sigur tó, at tað eru komnir fyrispurningar til Vesturvón frá persónum, sum eru áhugaðir í at leiga virkið, og lata tað uppaftur.

Sambært Ólavi Jákupi Kristoffersen, advokati, sum selur maskinurnar, er tað Føroya Sparikassi, sum hevur kravt tær seldar. Av kredittdeildini í Føroya Sparikassa fekst at vita, tá Sosialurin ringdi, at maðurin, sum umsitir málið, ikki var at hitta. Hann hevði ikki latið frætt aftur frá sær, tá blaðið fór til prentingar.

Eftir stendur so eitt tómt flakavirki á bryggjuni í Sørvági, sum Vesturvón hevur fingið Fútarættin at stongt, tí felagið, sum hevði leigað bygningin hevði ikki goldið leigu.

gult13 cyan13 magenta13 svart13

Bilar

Nr. 79 • hósdagur • 26. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Rover 45 – væl gjørdur bilur frá Phoenix í Onglandi





*Rover 45, ið avloysir Rover 400, er ein av nýggju útgávunum sum er komin á marknaðin, eftir at Phoenix-samtakið ið Onglandi hevur keypt Rover*

**Rover 45, ið avloysir Rover 400, er ein av nýggju útgávunum sum er komin á marknaðin, eftir at Phoenix-samtakið ið Onglandi hevur keypt Rover. Bilurin er væl gjørdur, og hevur munandi betri koyrieginleikar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Ein tann mest umtalaða sølan í fjør, var tá BMW seldi Rover til Phoenix-samtakið. Teir keyptu Longbridge verksmiðjuna, og rættin til búmerkini MG, Austin, Wolsley, Morris, Standard, og Vanden Plas. BMW átók sær eisini at avskriva alt undirskotið tey seks árini teir áttu Rover. Tað sýnist at ganga sera væl hjá Phoenix samtakinum.

## Rover 45 er miðalstøddin

Nýggju eigararnir hava longu sett sín dám á Rover bilarnar. Tey trý modellini eita nú Rover 25, 45 og 75. Miðal støddin er Rover 45, sum í veruleikanum ein "facelift" av Rover 400. 35 prosent av komponentunum í bilinum eru nýggir. Stórur munur er tó á koyrieginleikunum, sum eru munandi betraðir, við tað at bilurin virkar nógv tryggari og hevur gott vegtak.



*Bilurin er rúmligur við 370 l. viðførisrúmi*

## Í besta Rover stíli

Bilurin vit royndarkoyrdu var ein sedan við 4 hurðum. Hann er góður at koma inn í, lætt er at finna seg til rættis, við at stilla rattið og førarasetri sum tað passar seg best. Veloursetrini eru tey somu sum í Rover 75, og nøtutræ panelir eru á instrumentborðinum, á hurðunum og í gardanboksini, í besta Rover stíli. Saman við teimum góðu koyrieginleikunum, merkist at bilurin er sera væl gjørdur.

## Alu-felgur eru standard

Motorurin er ein orkusparandi 1.8 litur, 16V bensin við 117 hk, og elektroniskari innspræning. Hesin motorurin passar væl til støddina á bilinum, við tað at hann er sera kvikur. Standard útgerðin í bilinum er til dømis, alufelgur, airbag framman og í síðunum, el-hitaði síðuspegl, el-síðurútar, CD anlegg, fjarðstýrt sentrallás við alarmi og startsperru.

## Rover 45 1.8 sedan

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl. 1.8 litur 16V 117 hk |
| 0-100 km/t | 9,3 sek. |
| Bensinnýtsla | 13,7 km/l |
| Dekkstødd | 195/55-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 452 cm |
| Breidd | 170 cm |
| Hædd | 139 cm |
| Eginvekt | 1150 kg |
| Totalvekt | 1650 kg |
| Viðførisrúm | 370 litrar |
| Prísur | kr. 196.800,-<br>(metallakk kr.3.000,- eyka) |
| Søluumboð | D.B.Bilar<br>J.Broncksgøta<br>FR-100 Tórshavn<br>Tlf. 310600 |